# r er á tindinum



*- Eg havi telvað nógv ímóti pápa mínum, sum eitur Sjúrður, og so hava mammubeiggjarnir, Rani og Eyðun, stimbrað meg nógv, sigur nýggi meistarin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

inum og studera teoriina. Men hann verður har afturímóti roknaður at hava stóra sinniliga styrki í kappingum, og at hava góð evni at lesa ella analysera undir talvunum.

*Hvat verður næsta uppgávan, og hvør er næsti dreymurin?*

- Eg veit ikki, hvør næsta uppgávan verður. Men eg vænti, at eg fari at luttaka í onkrum kappingum í summar. Dreymurin er at vinna ein IM norm. Nær tann dreymurin kann gerast til veruleika, dugi eg ikki at siga nakað um.

### Nýtt ættarlið

Fýra av teimum við hægstu styrkistølunum vóru ikki við í hesi FM kappingini. Men seks av teimjum tíggju bestu vóru við og ellivu av teimum fimtan fremstu. Úrslitið vísir, at tað er nýggja ættarliðið í føroyskari telving, sum hevur sett seg á ovastu plássini.

Hóast hann er knappliga 26, so má Carl Eli metast at hoyra til hetta ættarliðið. Á næsta plássunum vóru Martin Poulsen og Hans Kristian Simonsen. Hóast teir hava verið í fremstu røð í fleiri ár, so eru teir ikki meiri enn umleið 20 ára gamlir. Og so skal ikki minst leggjast til merkis Helga Dam Ziska. Hann og Hans Kristian høvdu á triðja plássinum eitt hálvt stig minni enn teir báðir, sum vóru í umdysti um FM heitið. Helgi er framúr evnagóður, og tað verður bara mett at vera ein spurningur um tíð, áðrenn hann fer at vinna meistaraskapin.

## Talvið hesa vikuna

Spurdur, hvat talv hann sjálvur var best nøgdur um í FM-kappingini er nýggi føroyameistarin skjótur at svara:

– Tað var talvið móti Torkil í seinasta umfari. Bæði tí tað var eitt gott talv hjá mær, og ikki minst tí hetta var sera týdningarmikið, er greiða aftursvarið.

Samuelsen, Carl Eli Nolsoe (2238) - Nielsen, Torkil (2153)
FM 2005 Oyrarbakka - Group La (Oyrarbakka), 2005.03.26

1.e4 e5 2.Sf3 Sc6 3.d4 exd4 4.Sxd4 Sf6 5.Sxc6 bxc6 6.e5 De7 7.De2 Sd5 8.c4 La6 9.b3 Sb6 10.Lb2 De6 11.a3 Le7 12.f4 O-O-O 13.Dc2 Lb7 14.Ld3 Kb8 15.O-O f6 16.Sd2 fxe5 17.Tae1 Thf8 18.Lxe5 Df7 19.Lxh7 Lxa3 20.Lg6 Lc5+ 21.Kh1 Dg8 22.Dc3 Ld6 23.Lxd6 cxd6 24.Se4 d5 25.De5+ Ka8 26.Ta1 a6 27.Dc7 Sxc4 28.Txa6+ 1-0

**Endastøðan, FM**

| **Rk. Name** | **RtgN** | **RtgI** | **Club/City** | **Pts.** |
|---|---|---|---|---|
| 1 Poulsen Martin | 2306 | 2285 | Havnar T | 6.5 |
| 2 Samuelsen Carl Eli Nolsoe | 2263 | 2238 | Vestmanna T | 6.5 |
| 3 Simonsen Hans Kristian | 2264 | 2317 | Kollafjordur T | 6.0 |
| 4 Ziska Helgi Dam | 1868 | 2129 | Havnar T | 6.0 |
| 5 Simonsen Olavur | 2193 | 2254 | Klaksvik TF | 5.5 |
| 6 Berg Olaf | 2206 | 2194 | Havnar T | 5.5 |
| 7 Hansen Pol Martin | 1884 | 0 | Kollafjordur T | 5.0 |
| 8 Nolsoe Eydun | 2224 | 2217 | Klaksvik TF | 4.5 |
| 9 Hansen Herluf | 1964 | 2032 | Havnar T | 4.5 |
| 10 Thorsteinsson Sjurdur | 1751 | 0 | Vestmanna T | 4.5 |
| 11 Johannesen Eydalvur | 1914 | 2003 | Kollafjordur T | 4.5 |
| 12 Nielsen Torkil | 2097 | 2153 | Sandavagur T | 4.0 |
| 13 Nolsoe Rani | 2058 | 2141 | Klaksvik TF | 4.0 |
| 14 Baldursson Rani | 1825 | 0 | Klaksvik TF | 4.0 |
| 15 Andreasen Jakup A R | 1889 | 1993 | Vestmanna T | 4.0 |
| 16 Olsen Wille | 1992 | 0 | Klaksvik TF | 3.5 |
| 17 Joensen John | 1800 | 0 | Gotu T | 3.5 |
| 18 Joensen Helgi | 1808 | 0 | Toftir T | 3.5 |
| 19 Andreasen Andreas | 1881 | 1974 | Toftir T | 3.0 |
| 20 Augustinussen Bernhard | 1780 | 1881 | Sandavagur T | 1.5 |